VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiðki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

# Starv hjá Føroya Skúlabókagrunni

Fyri eitt av starvsfólkum okkara, sum er í farloyvi, verður avloysarastarv í Føroya Skúlabókagrunni lýst til setanar frá 1. januar 2002 til 1. august 2004.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur í starvinum verður at kunna seg við tørvin á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærugreinum og undirvísingarevnum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum. Upplæring kann verða neyðug.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálastýrisins.

Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi ikki seinni enn 19. november 2001.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, Heðini M. Klein, telefon 316100.

Tórshavn, 25. oktober 2001.

Føroya Skúlabókagrunnur
Skúlabókanevndin
Lützenstrøð 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar

ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

# Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki til bókhaldið at byrja beinanvegin.

Viðkomandi má vera væl royndur innan bókhald og má kunna arbeiða sjálvsøtðugt.

Ringið ella skrivið til:

**Berg Motors**
Staravegur 1-3 100 Tórshavn
Tlf. 313 535

# Mekanikari

Søkt verður eftir mekanikara til lastvognsverkstaðið at byrja beinanvegin.

Viðkomandi má vera royndur innan hetta øki.

Ringið ella skrivið til:

**Berg Motors**
Staravegur 1-3 100 Tórshavn
Tlf. 313 535

KPMG

## Byggi- ella verkfrøðingur

Fyri ein av kundum okkara, eitt byggifelag í Tórshavn, verður søkt eftir ungum byggiella verkfrøðingi at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Tann, ið settur verður kemur at taka sær av fyrifallandi arbeiði innan byggi- og anleggsarbeiði.

Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal verða útbúgvin byggi- ella verkfrøðingur. Eisini skal viðkomandi hava góð samstarvsevni, verða fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí.

Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 26. november 2001.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Elviru Poulsen ella John Petersen á tel 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34 Fax 34 34 35

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## MÁLSVIÐGERI TIL BYGGI- 0G BÝARSKIPANARDEILDINA

Søkt verður eftir starvsfólki við tekniskari útbúgving til byggimálsviðgerð o.a. at byrja beinanvegin. Talan er um eitt fulltíðarstarv á byggi- og býarskipanardeildini.

**Høvuðsuppgávur**
- Byggimálsviðgerð.
- Byggieftirlit.
- At fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri byggi- og býarskipanarnevndina, og skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og býráðssamtyktum.
- Samskifta við borgarar, feløg og stovnar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera útbúgvin tekniskt hjálparfólk, byggiteknikari, byggifrøðingur, verkfrøðingur ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Umsøkjarin skal duga væl føroyskt og helst hava kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad/MicroStation GeoOutlook.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett beinanvegin ella skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv , ið er fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10.12.2001. Viðmerkt á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

SNARSKIVAN

# Hús í miðbýnum í Havn

Húsini hava umleið 110 fermetrar búøki í trimum hæddum – alt innrættað. Lítil urtagarður er um húsini.
Loft: 2 kømur og wc.
Miðhædd: stova og køkur.
Kjallari: 2 kømur, klæðnarúm og baðirúm.

Húsini, sum upprunaliga eru 200 ára gomul, eru høvuðsuppvæld uttan og innan 1997–1999. Verða seld fyri hægsta boð.

**Tlf. 319775**



# *Avloysarastarv*

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja rakstrurin.

Núverandi setanarøki er Streymoyar øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Heimasíða
*www.tollskatt.fo*

E-mail
*streymoy@tollskatt.fo*

Søkt verður eftir avloysara til kassan á Tollbúðini vegna barnsburðarfarloyvi.

**Arbeiðsuppgávur**
Vanligt kassaarbeiði, inn- og útgjøld umframt annað arbeiði í sambandi við kassan.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við kunnleika til kassa/avgreiðsluarbeiði hava fyrimun. Viðkomandi verður harumframt upplærd/ur á staðnum.

**Avloysaratíðarskeið**
Frá umleið 10. desember 2001 til 1. august 2002 møguliga longri.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og lønin sambært 3. lønarflokki í sama sáttmála.

**Spurningar hesum viðvíkjandi** kunnu setast Kjartan Dam Joensen, yvirtollara, á tlf. 31 02 60, lok. 163.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**26. november 2001**

**Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki**
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Peter Belli & Østjydsk Musikforsyning

Friggjakvøldið 23. november kl. 22.00
Kostnaður kr. 125,-.
- atgongumerki fáast til keyps á Kunningarstovuni & 3'arinum



Hotel Föroyar bjóðar í hesum sambandi:
STÓRT KALT BORÐ
frá kl. 20.00
Kostnaður kr. 175,-

*Borðbílegging á tlf. 317500*

Hotel Föroyar Best Western

Sosialurin - 311820

# FIRMAKAPPING!!!

**Skála Ítróttarfelag vil hervið boða frá at firmakapping verður í høllini á Skála tann 24. november.**

- Spælt verður við hondbóltsmálum. Málmaðurin hevur ikki loyvi at brúka hendurnar
- Fýra leikarar eru á vøllinum, ein framman fyri miðjuna. Loyvt er at hava tveir útskiftarar
- Tað er bert loyvt at hava ein leikara, ið hevur leikt við 1. deild síðsta kappingarár, á liðnum. Eisini er loyvt at hava ein leikara, ið hevur leikt við 2. deild ella unglingum síðsta kappingarár. Lið, ið ikki halda hesa reglu, sleppa ikki at luttaka.

Seinasta freist at tekna seg til luttøku er mikudagin 21. november. Luttøkugjald er 400,- kr. Øll virkir eru vælkomin at luttaka.

Um tit ynskja at luttaka ella kanska onkrir spurningar eru, kunnu tit ringja á tlf. **227397/447670** ella **223804/449804.**

**Skála Ítróttarfelag**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3265
Navn: Sp/f Rognsøy Invest
Adressa: Birnugøta 1, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 12.11.2001
Viðtøkudato: 12.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Richard Rognsøy, Birnugøta 1, 100 Tórshavn.
Stjórn: Richard Rognsøy, Birnugøta 1, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 12.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga partabrøv, at reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 15. november 2001

Kristin Balle

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Økispedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir økispedagogi.

Dagrøktarskipanin í Tórshavnar kommunu er normerað til 300 børn, og umleið 65 dagrøktarar starvast í skipanini.

**Arbeiðið fevnir m.a. um**
- vegleiðing av dagrøktarmammum
- at skipa fyri ymiskum tiltøkum
- foreldrasamstarv.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Vit ynskja**
at tú hevur royndir innan dagstovnaøkið, arbeiðir sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri í 11./13. lønarflokki

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, dagrøktarleiðara, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1.desember 2001.

Viðmerk umsóknina " økispedagogur".

SNARSKIVAN